# Alternativ bygging í Sørvági



*Alternativu sethúsini í Sørvági skulu byggjast á Billu við góðum útsýni yvir fjørðin*

**Sørvingar hava uppskot um at byggja 22 sethús á Billubø, sum er seinasti møguleikin at slíka bygging niðri í bygdini**

HÚSABYGGING
*Ólavur í Beit*
*beiti@kallnet.fo*

- Føroyar og ikki minst Sørvágur eru eyðkendar fyri sítt livandi landslag, men hetta landslag er lítið í mun til onnur. Hetta er serstakt og krevur tí eisini serstaka bygging. Soleiðis tekur Jákup á Stongum til í byrjanini til samrøðuna.

Jákup á Stongum hevur saman við øðrum sent uppskot inn til Sørvágs kommunu um alternativa sethúsabygging á Billubønum. Uppskotið eru 22 sethús, sett í lendið soleiðis, at hvørt húsið hevur sítt serstaka umhvørvi í landslagnum.

Alternativa uppskotið er ein heildarætlan fyri allan Billubøin, har tveir vegir eru inn á økið eystantil í erva og í neðra. Inni á sjálvum økinum er eingin gjøgnumgangandi ferðsla og heldur ongar brekkur.

Húsini eru úr 100 til 230 fermetrar stór og øll hava útsýni út á fjørðin. Og kostnaðurin verður helst á sama støði sum eini vanlig sethús í somu støðd.

Jákup á Stongum, stjóri í West-tech og stigtakari til ætlanina sigur, at hann hevur arbeitt við hugsanini um at gera útstykkingar sum fella inn í føroyska landslagið síðani hann fór at lesa til arkitekt.

- Men tíðin er sjáldan til gransking og skitsering sum skal til, tá ið tú skalt fara undir eina sovorðna ætlan. Vit eru so bundin av tí sum vit eru von við, og møguleikarnir til at gera eitt sovorðið uppskot standa tær tí eisini sjáldan í boði.

- Viðvíkjandi Billubønum so er hetta seinasti møguleiki til alternativa bygging niðri í bygdini. Og tí hava vit sent eina umsókn inn til Sørvágs kommunu, sigur Jákup á Stongum.

Tað eru Spf. West-Tech, Spf. Berg Rasmussen, Spf. K. J. O., og Spf. Handilsvirki Niclasen sum saman søkja um byggiloyvi til ætlanina.

Jákup á Stongum sigur annars, at serliga bygdirnar hava tørv á alternativari bygging, tí at nógvastaðni er bygt á tað vallaða lendið, og tað sum vit eru von við dugur ikki í livandi lendi. Avgerandi er, at hædd verður tikin fyri hesum, tá ið útstykkingar verða gjørdar.

# Ferðafólk fáa tráðleyst samband

**Ein stórur krani hevur í dag heysað nýggja breiðbandsútgerð umborð Norrönu. Tað merkir, at bæði ferðafólk og manning fáa tráðleyst internetsamband.**

**Væntandi verður sambandið klárt um tvær-tríggjar vikur**

SAMSKIFTI
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í dag verður útgerð til breiðbandsatgongd sett umborð á Norrönu. Breiðbandsloysnin fer at geva Smyril Line virknari arbeiðsumstøður, tí starvsfólk og ferðafólk umborð alla tíðina kunnu hava tætt samskifti við síni kæru og starvsfelagar á landi, stendur í tíðindaskrivi frá Føroya Tele, ið veitir tænastuna í samstarvi við Vikmar.

- Hetta er sera týdningarmikið, tá hugsað verður um, at Norröna er okkara einasta ferðamannaskip og sostatt einasta fasta sjóvegis samband hjá føroyskum ferðafólki við útheimin, skrivar Føroya Tele.

Fyrrapartin hevur stórur staðið á Busatanga og arbeitt við at lyfta útgerðina umborð. Tað snýr dragar seg til dømis um stórar parabolantennir, sum taka niður dáta umvegis fylgisvein.

Sett verður upp eitt 4 M/512K samband. Endamálið er at geva Norrönu størri bandbreidd til internetið, so viðskiftafólk skulu kunna keypa breiðbandsatgongd umborð. Allur dátaflutningur og telefonisamskifti á skipinum fer tá at fara fram umvegis breiðbandssambandið. Hetta merki, at Norröna alla tíðina fer at hava tætt samskifti við skrivstovuna á landi og umheimin annars.

Tað hevur leingi verið arbeitt við at fyrireika breiðbandsloysnina umborð á Norrönu, sum verður sett upp á túrinum til Íslands og síðani royndarkoyrd. Sambandið verður væntandi klárt um 14 dagar til tríggjar vikur.




*Um tvær-tríggjar vikur fáa bæði manning og ferðafólk umborð á Norrönu tráðleysa atgongd til internetið. Her heysar ein krani breiðbandsútgerð umborð av Busatanga*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





## Sansir søkja fíggjarleiðara

Sansir er ein fyritøka í stórari framgongd, og umsetningurin er trífaldaður seinastu 4 árini. Vit hava sett deild á stovn í Keypmannahavn, og ætlanin er næstu árini eisini at seta deildir á stovn aðrastaðni.

Av tí at virksemið hjá Sansum er vaksið, er eisini neyðugt, at Sansir fær eina nýggja, dygga fíggjarstýring. Hesa fíggjarstýring skalt tú verða við til at uppbyggja saman við leiðsluni, okkara fyriskipara og kt-leiðara.

Tú fært ábyrgdina av rakstrar- og íløgufíggingini, av dagliga bókhaldinum, herímillum at leggja fíggjarætlanir, at gera mánaðar- og ársroknskapir, at greiða lønarviðurskiftini hjá starvsfólkunum o.a. Tú kemur í byrjanini at taka tær av sjálvum bókhaldinum.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú HD í roknskapi ella cand. merc.

Tú hevur hollan kunnleika til bókhald og roknskap, og tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Sansir eru ein framfýsin samskiftisfyritøka við 33 starvsfólkum í fýra ymiskum londum. Vit skapa kunningar- og marknaðarføringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum verður við til at skapa framtíðina saman við okkum. Sjálvandi fært tú eina góða løn.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 29. mai klokkan 16. Umsóknir kunnu sendast við vanligum posti ella við telduposti til Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo ella Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo. Vinarliga viðmerk tín teldupost og títt fartelefonnummar.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Lenu L. Mohr ella Høgna Rasmussen á tel 355 355. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Lenu ella Høgna.

Send umsóknina til:

Sansir
Dvørgastígur 7
Postsmoga 1099
FO-110 Tórshavn.

SANSIR

sansir.fo